Vikuskiftið Sosialurin


## Albert Jónsson íslendskur aðalkonsul:

# Gleðist um at búgva í Føroyum

Í sambandi við at íslendski sendiharrin Albert Jónsson hevur tikið við sum aðalkonsul Íslands í Føroyum var móttøka í embætishúsunum í Hanusargøtu í Havn hósdagin 18. mars

Albert Jónsson byrjaði sína embætisleið sum politiskur ráðgevi hjá íslendska forsætismálaráðharranum, og arbeiddi á skrivstovuni hjá forsætismálaráðharranum frá 1991.

Starvið í uttanríkismálaráðnum og síðani í forsætismálaráðnum førdi til, at Albert Jónsson fekk møguleikan at gerast ambassadørur Íslands í USA við bústaði í Washington. Nú er hann so aðalkonsul Íslands í Føroyum.

Nýggi konsulin kennir seg væl í Føroyum, bæði eg sjálvur og konan Ása Baldvinsdóttir, gleðast um at búgva her í Føroyum, sum er eitt vakurt land við ófatiligari náttúru. Og mær dámar jú serliga væl at vera úti í náttúruni, og ein av mínum frítíðar áhugamálum er at ganga túrar úti í náttúruni, og ein annar er at fiska, og tað er ríkiligt av møguleikum fyri tí her í Føroyum, sigur Albert Jónsson.

*mg*

*Myndir: Jan Müller*



*Hósdagin var móttøka í sambandi við at íslendski sendiharrin Albert Jónsson hevur tikið við sum aðalkonsul Íslands í Føroyum. Her saman við konuni Ásu Baldvinsdóttir*



*Jørgen Niclasen, Sigmund Isfeld og Ása Baldvinsdóttir*



*Poul Mohr og Albert Jónsson*



*Albert Jónsson og Marjun Hanusardóttir*



*Albert Jónsson og Magni Arge*



*Albert Jónsson og Jørgen Niclasen*



*Herluf Sigvardsen og Jørgen Niclasen*



*Høgni Hoydal, Albert Jónsson og Petur Nolsøe*